# Prutl við skaða til sølu

**Merki:** Atala Skeggia
**Árg.:** Okt. 2001
**KM.:** 206

Prutlið verður selt sum tað stendur nú, og kann síggjast hjá SP/F C.N. Bygg, Heiðarnar, FO 950 Porkeri.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tlf. 373890
Fax. nr. 373117
Fartelefon 224859
at hitta millum kl. $08^{00}$–$10^{00}$
Magnus E. Joensen
Sýnsmaður

# Prutl við skaða til sølu

**Merki:** Derbi Predator
**Árg.:** Sept. 1999
**KM.:** 3,035

Prutlið verður selt sum tað stendur nú. Og kann síggjast hjá SIGMA IMPORT v/ Sigmund Olsen, FO 950 Porkeri.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tlf. 373890
Fax. nr. 373117
Fartelefon 224859
at hitta millum kl. $08^{00}$–$10^{00}$
Magnus E. Joensen
Sýnsmaður

KPMG

# Bókhaldari

Fyri ein av kundum okkara verður søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði.
Bókhaldsskipanin Navision Financials verður nýtt.
Talan er um eitt avbjóðandi og áhugavert starv.

**Umsøkjarin**
Tann, sum settur verður, skal hava kunnleika til bókhald, kunna arbeiða sjálvstøðugt og annars verða fyrikomandi og fryntligur.
Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision Financials, er ein fyrimunur, men eingin treyt.
Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 10. desember 2001.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Rúna Poulsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo E·mail: kpmg@kpmg.fo

team85

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3272
Navn: Sp/f BK Invest
Adressa: Landavegur 7, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 19.11.2001
Viðtøkudato: 19.11.2001
Kapitalur: Kr. 299.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 299.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Beinir Kristiansen, Landavegur 7, 100 Tórshavn.
Stjórn: Beinir Kristiansen, Landavegur 7, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
Grannskoðari: : Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Patursonargøta 3, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 19.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, ídnað, gera íløgur og hava annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 29. november 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3264
Navn: Sp/f 04-10-01
Adressa: Kráargøta 1, 160 Argir
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 02.11.2001
Viðtøkudato: 02.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: Gunvør Balle, Kráargøta 1, 160 Argir og Sigurð í Jákupsstovu, Kráargøta 1, 160 Argir.
Stjórn: Gunvør Balle, Kráargøta 1, 160 Argir.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 17.09.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 29. november 2001

Kristin Balle

Sosialurin -tað loysir seg

**Sjúkrasystraskúli Føroya**
Fo 100 Tórshavn

# Skrivari

Eitt starv sum skrivari á fulla tíð er leyst til setan 1. januar 2002.

Sjúkrasystraskúli Føroya skipar fyri sjúkrasystraútbúgving. Skúlin hevur felags fyrisiting við Almanna- og heilsuútbúgvingarnar, sum fara fram á Tvøroyri.

**Høvuðsuppgávur hjá skrivaranum fevna um:**

- Leggja til rættis og útinna dagliga skrivstovuhaldið á skúlanum, herundir gera arkiveringsskipan og bókasavnsarbeiði
- Bókhald- og roknskaparføring (Fíggjarskipan Landsins)
- Vera við í arbeiðinum at menna telduskipanina
- Samskifta við leiðslu, lærarar, lesandi, næmingar og praktistøð

**Førleikakrøv:**

- Útbúgving og royndir innan skrivstovuhald og journalisering/arkivering
- Royndir innan bókhald
- Kunnleika og royndir innan nýtslu av edv
- Hava málkunnleika, herundir duga væl føroyskt og enskt
- Duga av arbeiða sjálvstøðugt
- Vera fyrikomandi og duga at fáast við ung fólk
- Góð samskiftis- og samstarvsevnir

**Vit bjóða:**

- Eitt á mangan hátt sjálvstøðugt og áhugavert starv, sum er í menning.
  Tú kemur at starvast í einum góðum arbeiðsumhvørvi í samstarvi við leiðslu og lærarar á skúlanum.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið og verður lønt í 15. lønarflokki.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Sjúkrasystraskúla Føroya**
Att. Rektaran
Eirargarður 14 B
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. desember 2001.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú venda tær til Bergliot Ihlen, rektara, á telefon 316027 lokal 436.

# Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

## Hugnaløta

Leygardagin 1. desember kl. 15.00 - 18.00 verður hugnaløta í hølunum á Áarvegnum. Øll eru vælkomin til ein drekkamunn og prát.

**Nevndin**

# Tænastumannastarv

**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Streymoyar øki, har viðkomandi kemur at arbeiða, eru 60 starvsfólk.

Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail:

streymoy@tollskatt.fo

Starvið sum deildarleiðari fyri Toll- og skattadeildina í Streymoyar øki verður hervið lýst leyst at seta skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávur**
Deildin, ið er normerað til 20 størv, umfatar tollkreditt, løntakara- og roknskaparlíkning, avgreiðslu, journal/arkiv, vekslara, post, stempulklokku v.m. Eisini skal deildarleiðarin vera næsti maður økisstjórans, tá ið honum berst frá.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við t.d. merkonomútbúgving í roknskapi, arbeiðsroyndir innan skatt, toll og mvg og royndir innan leiðslu, hava fyrimun.

**Vit kunna bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Starvið er tænastumannastarv, og verður lønin sambært 34. lønarflokki í tænastumannasáttmálanum, og verða fyrstu tvey árini royndartíð.

Núverandi setanarøki er Streymoyar øki, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Fyrispurningar starvinum viðvíkjandi kunnu setast Eyðfinni Hansen, økisstjóra, á tlf. 31 02 60.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**17. desember 2001**

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

Starv

# Handverkari til verkstaðið

Á verkstaðnum, sum er undir Farmaleiðum, er eitt starv sum handverkari leyst at seta.

**Starvið fevnir um**
Viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, bussar o.a. útbúnað.

**Førleikakrøv**

- Mekaniska útbúgving
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Áhugaði skulu senda umsókn til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 10. desember 2001, kl. 10:00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343060 ella e-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki 3/4 tíð til Fuglafjarðar skúla til setan 15. januar 2002 ella skjótast eftir hetta.

Starvsøkið fevnir um at taka sær av øllum vanligum skrivstovuarbeiði, telefonavgreiðslu v.m.

Umsøkjari við royndum frá almennari fyrisiting ella øðrum skrivstovuarbeiði hevur fyrimun.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á telefon 444087.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum og upplýsingum um royndir skulu vera Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður, í hendi í seinasta lagi týsdagin **18. desember 2001 kl. 15.00.**

*Fuglafjørður, tann 29. november 2001*

**Fuglafjarðar býráð**

# Nýggj Tvingsilsøla

Fríggjadagin tann 14. desember 2001 kl. 09.15 verður á dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn hildin nýggj tvingsilsølu yvir matr. nr. 126 Sørvágur. (AS 30/2001).
Talan er um eini sethús við kjallara, stovuhædd og loft, har hvør hæddin er 50 m2 og smb. tingbókina er grundstykkið 566 m2 til víddar. Sethúsini eru gjørd av timbri á grótgrund, klædd við plastikki og takt við jarni. Í stovuhæddini er køkur, tvær stovur, kamar, baðirúm og gangur. Á loftinum eru 5 lítil kømur, goymslurúm og gangur. Kjallarin er allur í einum. Úthús er omanfyri húsini. Sethúsini eru bygd í 1915 og treingja til ábøtur.
Fyrsta uppboðssølan var tann 15. november 2001. Hægsta boð var 159.000 kr.
Uppboðssølan er umbiðin av Annfinn V. Hansen, advokati, telefon 359595, ið kann geva nærri upplýsingar um ognina, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.
Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

*Føroya Fútarættur, 27. november 2001*
**Kim V. Ottesen**
dómarafulltrúi

# Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til avgreiðsluna á býráðsskrivstovuni til setan 15. januar 2002 ella skjótast eftir hetta.

Starvsøkið fevnir um at taka sær avgreiðsluni/telefonavgreiðsluni, kassa, fólkayvirliti og annars alt fyrifallandi arbeiði á skrivstouni.

Umsøkjari við royndum frá almennari fyrisiting ella øðrum skrivstovuarbneiði hevur fyrimun.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 444006 lokal 11.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum og upplýsingum um royndir skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi **týsdagin 18. desember 2001 kl. 15.00**

*Fuglafjørður, tann 29. november 2001*

**Fuglafjarðar býráð**